## Kristoffur heldur fram




Kristoffur Jakobsen spælur eisini við KÍ í 2009. Miðvallarin hevur longt sáttmálan við barndómsfelagið, og tískil verður hann tøkur hjá nýggja venjaraparinum í komandi kappingarár. - Tað er av stórum týdningi at okkara egnu leikarar støðast og trívast í felagnum, og hetta fara vit at leggja stóran dent á framyvir, sigur Tummas Lervig, formaður, við heimasíðuna hjá KÍ. Hann staðfestir, at felagið í løtuni arbeiðir við leingja flestu sáttmálarnir.

## Claus vann málríkan dyst

Blackpool var tríggjar ferðir aftanfyri, men megnaði kortini at vinna útidystin ímóti Watford í næstbestu ensku fótbóltsdeildini um vikuskiftið. Claus Bech Jørgensen, sum hevur verið burtur við skaða, spældi við aftur, og hann var á vøllinum allan dyst. Watfor kom tríggjar ferðir fram um, men Blackpool javnaði hvørjaferð, og tríggjar minuttir inn í yvirtíðina skoraði Blackpool sigursmálið.

Neistin-VB 19-23 (10-15):

# VB tók alt

**VB vann seg aftur á næstovasta plássið í Sunset-deildini, tá tær settu Neistan upp á pláss í Havn**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Dysturin leygardagin var ein uppgerð millum tvey av liðunum, sum hava sett sær fyri at elta Stjørnuna í oddinum av føroysku kvinnukappingini. Og skal metast eftir fyrstu styrkisroyndini teirra millum, so er tað VB, sum er betur fyri í teirri kapprenningini.

### Skrædnaði skjótt

Grundina til sigurin stoyptu gestirnir alt fyri eitt í dystinum. Fyrstu løtuna megnaðu tær sera væl at halda Neistanum frá teimum heilt stóru royndunum, og tá VB samstundis fekk ferð á sítt álopsspæl, har alt ikki einvíst koyrdi upp á sama spælara, skrædnaði veruliga millum liðini longu fyrsta korterið.

Og tann munin vann Neistin ongan tíð aftur. VB helst støðugt dystin í einum føstum taki, har fýra-fimm mál alla tíðina vóru á muni, og tí gjørdist talan ongan tíð um tann heilt stóra spenningin.

Sigurin ber við sær, at VB í løtuni er fremsti avbjóðarin hjá Stjørnuni, og ta støðuna skulu vágbingarnir so royna at halda fast um komandi umfarið. Tá spælir VB móti Tjaldrinum, sum veruliga hevur bitið frá sær í ár, og sum aftur um vikuskiftið vísti sera góðar taktir.

Neistin noyðist fyriblis at taka til takkar við at liggja í bakhjólinum, men enn er munurin upp til restina ikki tann heilt stóri, kortini.



*Laila Jespersen og liðfelagarnir úr VB eru í løtuni besta boðið upp á ein avbjóðara til Stjørnuna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### FAKTA

**Neistin-VB 19-23 (10-15)**
10 min: 2-5
20 min: 5-10
40 min: 12-16
50 min: 16-20
**Málskjúttar**
**Neistin:** Trine Olsen 5, Heidi Maria Akselsen 4, Annika Ljósstein 4, Nicoleta R. Hansen 2(2), Anja Heinadóttir 1, Elin Staksund 1, Anne Kildevæd 1, Rakul Augustinussen 1
**VB:** Daiva Toumaite 8(2), Bára Mortensen 5, Gurið Mortensen 4, Laila Jespersen 3, Una Egilsdóttir 1, Svava Vestergaard 1, Theresa Joensen 1
**Brotskøst:** Neistin 4, VB 2
**Útvísingar:** Neistin 3, VB 4
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen

Kyndil-StÍF 20-21 (10-11):

# StÍF úr botninum

**Tá Kyndil bert skoraði tríggjar ferðir seinastu 19 minuttirnar, kundi StÍF fara úr Havnini við báðum stigunum fyri dystin sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

StÍF og Kyndil hava higar til víst seg sum veikastu liðini í kvinnukappingini í hondbólti. Undan dystinum hevði hvørki teirra vunnið stig, og skuldi botnurin fáast nakað burturfrá, var ein sigur tí kravið, tá liðini hittust í Havn sunnudagin.

Á pappírinum var talan um javna uppgerð, og í veruleikanum gjørdist hon eisini júst so jøvn, sum roknast kundi við.

Gestirnir komu kanska betur frá byrjan, men Kyndil slepti ongan tíð takinum, og munurin undan steðginum var tí lítil og eingin.

Fyrstu løtuna eftir steðgin kom tó ferð á tær grønu. Fyrstu góðu tíggju minuttirnar eftir steðgin vunnu tær grønu 7-3, og so skuldi sigurin so avgjørt verið heilt nær. Men onkursvegna steðgaði alt upp kortini. Eftir hetta skoraði Kyndil bara tríggjar ferðir, og so eydnaðist tað Ninnu K. Johansen at skjóta tær hvítu framum, tá hon skoraði fýra av seks teimum seinastu málunum hjá StÍF.

Sigurin ber við sær, at StÍF nú er komið á talvuna.

Kyndil er framvegis stigaleyst í botninum.

### FAKTA

**Kyndil-StÍF 20-21 (10-11)**
10 min: 3-6
20 min: 7-7
40 min: 16-14
50 min: 18-18
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Jacklin Durhuus 9(3), Rakul N. Joensen 4, Halla Midjord 4, Marina Ziljko 2, Helena á Krákusteini 1, Ása Christiansen 1
**StÍF:** Ninna K. Johansen 7(2), Rebekka Justinussen 5(1), Poula D. Olsen 3, Fríðrún Danielsen 3, Sunfríð Johansen 1, Signhild Petersen 1, Ásgerð Káradóttir 1
**Brotskøst:** Kyndil 3, StÍF 4
**Útvísingar:** Kyndil 3, StÍF 4
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen

